sosialurin

Fleiri rásir - einki roks

TV3 • Sunnudagin kl. 20.00

## Hitch

Alex “Hitch” Hitchens veit, hvat damurnar vilja hava. Og gávumildur, sum hann er, gevur hann góð ráð til mongu mannfólkini, sum ikki kenna kynstrið eins væl. Men hann tekur seg eisini væl betaltan fyri hetta. Tá Hitch hittir Sara, sum er tíðindakvinna, hóttir hon við at avdúka hansara góða handil, og samstundis hevur Hitch úr at gera við púrasta høpisleysa Albert, sum er fittur, men als ikki skilir konufólk.



# VARPIÐ



Canal+Film1 • Leygardagin kl. 19.00

## Failure to Launch

Sum 35 ára gamal býr Tripp framvegis heima hjá foreldrum sínum. Tey vita ikki, hvussu tey skulu fáa hann út úr trygga reiðrinum, so tey fáa fatur á einum yrkisfólki. Hon skal manipulera Tripp, so hesin vil flyta. Men so er tað, at kærleikin ger seg galdandi.



Kanal5 • Fríggjdagin kl. 20.00

## Spionen der elskede mig

Í 10. Bond-filminum skal Roger Moore fyri triðu ferð royna seg sum sjarmerandi 007. Hesa ferð skal hann royna seg móti reiðaranum Karl Stromberg, sum rænir enskar og russiskar kavbátar, og sum nú hóttir heimin við kjarnorkuvápnum.

FRÍGGJADAGUR 31. AUGUST 2007

Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið